Morfin og tablettir stolnar á Venus

Línubáturin Venus, sum er heimahoyrandi í Sandavági, hevði fríggjanáttina óbodnar gestir, sum tóku rúsandi evni úr heilivágsskápinum

LØGREGLUTÍÐINDI
Stefan í Skorini

Fríggjanáttina hevur onkur brotið inn umborð á línubátinum Venus, sum lá í Miðvági hesa náttina.

Innbrotstjóvurin er farin beinleiðis eftir heilivágsskápinum, sum var á brúnni. Skápið er brotið upp, og viðkomandi er sloppin avstað við nøkrum ampullum av morfini og nøkrum sterkum tablettum.

Enn ber ikki til at siga, nær innbrotið er framt, tí løgreglan hevur ikki fingið hendur á gerningsmanninum.

Tøkk

Hjartans tøkk fyri sýnda samkenslu, tá kæra kona, mamma, vermamma, omma og langomma okkara

Fía Egholm,
Vestmanna

doyði og varð jarðað.

Tøkk til prest, kirkjutænarar, sangarar og berarar, og tykkum mongu, ið fylgdu henni til hennara seinasta hvíldarstað. Ein serstøk tøkk til tykkum í heimarøktini, sum passaðu hana so væl ta tíðina, hon var sjúk. Takk fyri blómur og kransar, og eisini verður takkað fyri peningagávur til Eldrasambýlið í Vestmanna.

Fyri tey avvarðandi
Hans, Elsa, Hans J., Poula og Tórhallur

Tøkk

Hjartaliga tøkk fyri sýnda samkenslu,
tá kæri maður mín

Kraus Joensen
ættaður av Selatrað

doyði og varð jarðaður.

Tøkk til tykkum, ið sendu blómur og kransar.

Ein serstøk tøkk til Eysturoyar Ellis- og Røktarheim fyri fløvandi hendur um okkum bæði, og til tykkum, ið hjálptu til við jarðarferðina.
Eingin nevndur, eingin gloymdur.

Helena

15 ára gamal stungin við knívi:

Misti eygað

Leygarnáttina framdi ein 14 ára gamal drongur grovan harðskap móti einum 15 ára gomlum, sum mátti leggjast undir skurð á landssjúkrahúsinum og misti sjónina í øðrum eyganum

HARÐSKAPUR
Stefan í Skorini

Leygarnáttina klokkan 3 fekk løgreglan í Havn fráboðan um grovan harðskap, sum var framdur við knívi. Drongurin varð beinanvegin lagdur undir skurð á landssjúkrahúsinum, har hann var undir læknahond í tríggjar tímar.

Hann hevur fingið álvarsamt mein, tí álopið hevur verið ógvusligt. Fyrst varð drongurin stungin í vinstra eyga, og hann hevur mist sjónina. Eygað er ógvuliga illa farið, sigur Thorvald Lützen, ið er pápi drongin, sum varð álopin.

Síðani varð hann stungin einaferð í økslina og tvær ferðir í tjúkkan. Jakkin ber eisini merki eftir knívinum, sum ikki er komin ígjøgnum.

Konsert var í badmintonhøllini í Havn leygarkvøldið, og tað er her tilburðurin er farin fram. Álopið er framt beint frammanfyri pallinum, og tað var ein durðarvørur, sum varnaðist tilburðin og legði seg ímillum. Sum skilst so var stríðsmálið millum dreingirnar ikki nakað álvarsamt, men onkur lítil ósemja.

Ein 14 ára gamal kann ikki rættarsøkjast, og tí verður gerningsmaðurin ikki dømdur í hesum málinum. Lágmarkið er 15 ár. Løgreglan fer í dag, týsdagin, at kanna málið nærri, og tá verður greitt, um tað verður barnaverndin ella sosiala forsorgin, ið skal taka sær av dronginum víðari.

Gamla Norðborg virkar krabba

Gamla Norðborg virkar í dag krabba í Grønlandi. Fimm føroyingar arbeiða umborð

Gamla nótaskipið hjá Eileri Jacobsen, Norðborg, tekur nú ímóti krabba í Grønlandi. Útróðrarbátar lata skipinum krabba, sum síðani verður virkaður umborð

SKIP
Stefan í Skorini

Gamla Norðborg virkar nú sum innhandlingsskip í Grønlandi einar 15 fjórðingar sunnanfyri Nuuk. Skipið heldur seg mest innanfyri skerðgarðin, har tað tekur ímóti krabba.

Útróðrarbátar avreiða til skipið, sum virkar krabban til lidnar vøru umborð. Skipið er júst farið í gongd við hesa vinnuna, og úrslitið av fyrsta túrinum var, at skipið hevði 90 tons av lidnari vøru. Norðborg er umbygd til hetta endamálið, og stórir tangar eru settir upp, har krabbin verður frystur.

Tjúgu fólk eru umborð, og av teimum eru fimm føroyingar, sum enn eru við gamla føroyska skipinum.